# Fundarfrágreiðing til HSF-limafundi mikudagin 20. mai 2026

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Jógvan Emil Nielsen og Durita Thomsen fyri Starvsnevndina. Ári Rouch, Pól Hendrikkur Andreassen, Hallur Danielsen, Mark Lausen-Marcher og Andrass Thomsen fyri umsitingina. Bjørg Patursson og Tóra Seloy fyri VÍF. Pætur Jakobsen fyri Neistan. Jan Otto S. Holm og Heini Hellisdal Poulsen fyri Kyndil. Anna Dam, Beinta Fossádal og Eyðun Joensen fyri H71. Pauli Joensen fyri SÍF/Søljuna. Malan F. Justinussen og Rudi Olsen fyri ÍA. Karstin í Húsinum og Magnus Jacobsen fyri KÍF. Sunnuvá Eysturdal og Karstin Høghamar fyri EB. Lovisa Lassen og Mathias Lassen Samuelsen fyri Team Klaksvík. Ann Berg Christensen fyri StÍF.

Andrass Thomsen, stjóri, beyð vælkomin og gjøgnumgekk skránna.

**1.0 Dómaranevndin – ætlan fyri framtíðina**
Dánjal Samuelsen, dómaramennari, legði fram. Støðan við dómarum í fremstu deildunum er viðbrekin og er neyðugt við átøkum. Dánjal legði fram ætlanir fyri dómaraútbúgvina og átøk annars at betra um umstøðurnar hjá dómarunum. Til komandi kappingarár verður tað eitt krav, at øll feløgini, sum hava lið í fremstu deildunum, skulu melda eitt dómarapar til, hetta fyri hvørt lið, fyri ávikavist menn og kvinnur. Um ikki, fellur ein bót til felagið, hetta sambært kappingarreglunum. Eisini ynskir Dómaranevndin, at øll feløgini hava ein dómaraambassadør ella umboð, sum skal virka sum eitt dómarabindilið millum felagið og HSF.

**1.1 Niðurstøða**
Feløgini tóku undir við leistinum og átøkunum.

**2.0 Framløgu frá ÍA um venjaraspírar**
Malan F. Justinussen og Rudi Olsen hildu upplegg um teirra “venjaraspírar”. Hetta er átak í felagnum, at fáa tey ungu virkin og at hjálpa til. Tey ungu, 2-3, hjálpa vaksna venjaranum til eina venjinga um vikuna, tey eru hjálparvenjarar Endamálið er at menna spírarnar, bæði persónliga og ítróttaliga, at bjóða betri venjingar til tey yngstu og at skapa eina mentan, har fleiri sjálboðin trívast og fáa hug at vera ein virkin partur av felagnum.

**2.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunning gætur.

**3.0 Samanumtøka og eftirmeting av kappingarárinum 2025/26**
Ári Rouch, kappingarleiðari, tók samanum kappingarárið. Tað hevur gingið væl at avgreiða flestu kappingarnar. Samlaða talið av liðum, ið kappast, er vaksið. Heldur færri dystir hava verið útsettir. Avbjóðingar sum hava verið undanfarin ár eru tó enn til staðar, t.d. ungdómsdysir við kappingarbyrjan, tá fótbólturuin enn koyrir, at tá blíva nógvir dystir útsettir.

**3.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur, arbeitt verður við at fáa kappingarbyrjanina smidligari við færri útsettum dystum við kappingarbyrjan.

**4.0 Álmanakkin 2026/27**
Ári Rouch legði kappingarálmanakkan fram. Til komandi kappingarár verða 8 lið í bestu mansdeildini, og tískil verða øll umførini full umfør og kemur hetta at tætta hol í kappingini. Tíverrri verða bert 7 lið í bestu

kvinnuldeildini, og í sambandi við hetta, verða feløgini spurd um tey vilja fara upp í dystartali, at spæla 4 ferðir ímóti hvørjum øðrum. Hesin spurniningur verður sendur eftirfylgjandi til feløgini, og kunnu feløgini hareftir geva sína meining til kennar. Nakrar óvissur vóru kring HM- og EM-endaspølini hjá monnum og kvinnum, men var semja um møguligan fleksibiliteti kring hetta. Kappingin hjá teimum vaksnu næsta ár kemur at byrja eina viku fyrr. Hetta er meira í trá við hondbóltin í okkara grannalondum.

**4.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur og fáa møguleikan eftirfylgjandi at geva sína meining til kennar viðvíkjandi dystartali í kvinnudeildini.

**5.0 Samanumtøka av temadøgum**
Andrass Thomsen greiddi frá temadøgunum um ungdómshondbólt, sum hava verið. Tveir vóru tíverri avlýstir vegna vantandi undirtøku, men var ein góður og gevandi fundur um barnahondbóltin, t.e. U6 – U10. Fleiri góð hugskot komu burturúr fundinum, sum fara at vera niðurfeld í ein lítlan bókling, sum er ávegis. Talan er um eina vegleiðing, hetta m.a. í mun til upp- og niðurflyting av leikarum, tá leikarar spæla uppeftir, tvs. í tveimum árgangum, nágreinan av reglunum í U8 og U9, dystarfund millum venjarar og dómarar í mun til dómaralinju o.a.

**5.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur og kemur bóklingurin um barnahondbólt í næstum.

**6.0 U14 heystkapping**
Ári Rouch og Mark Lausen-Marcher greiddu frá møguleikanum fyri at hava eina U14-heystkapping áðrenn landskappingin byrjar. Hetta er hugsað sum eitt tilboð til tey feløgini, sum vilja byrja tíðliga við dystum, í mun til tey feløgini, sum í størri mun eru tengd av fótbóltsleikarum, har tað er torført at manna liðið tíðliga í kappingarárinum. Skotið var upp at heystkappingin hjá U14 byrjar um miðjan september og verður leikt yvir tvey vikuskifti.

**6.1 Niðurstøða**
Undirtøka var fyri uppskotinum.

**7.0 Aðalfundur 2026**
Andrass Thomsen greiddi frá, at aðalfundurin 2026 verður í Klaksvík tann 6. juni. Hann vísti á hvør stóð fyri vali og freistina annars at koma við málum til skránna.

**7.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**8.0 Fysisk venjing 2026/27**
Poul Hendrikur greiddi frá tilboðnum, sum hevur verið við fysiskari venjing í vetur, har hann kemur út til feløgini og leggur lag á. Skipanin hevur riggað væl, og er tað at fegnast um at feløgini hava prioritera tey ungu, soleiðis at hesi koma væl avstað í mun til styrkivenjing.   Skipanin kemur at halda fram komandi vetur við smærri tillagingum.

**8.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**9.0 Spideo og Solidsport**
Andrass Thomsen greiddi frá tilgongdini at skifta stroymingsskipan. Arbeitt verður við at fáa sjálvvirkandi Spideo kamera sett upp í hallirnar kring landið og ætlandi verður Solidsport platformurin, sum dystirnir verða vístir á.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**10.0 Avtala við Learnhandball fyri 2026/27**
Andrass Thomsen kunnaði um avtaluna við LearnHandball, sum er ein platformur øvilsum til venjing. HSF hevur gjørt avtalu um at feløgini í føroyum fáa atgongd til skipanina.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunniningini gætur og kemur meira kunning

**11.0 Venjaraskeið 2026/27**
Mark Lausen-Marcher kunnaði um skeiðskalendarin og tey venjaraskeið, sum verða komandi vetur.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch